# …Ímillum umsorgan, stuðul og eftirlit

*Framhald av síðu 16*

Nyttar tað við Kriminalforsorg?

Her er vert at hyggja at bólkinum sjálvboðin í mynd 1, ið er stórstur í Kriminalforsorigni. Tað eru tey, ið annaðhvørt ikki hava fingið dóm enn, og sum kortini ynskja at vera frívilliga í eftirliti, ella tey, ið eru liðug í eftirliti, men kenna seg ikki til reiðar at standa á egnum beinum.

Donsk kanning vísir, at 75% av viðskiftafólki kriminalforsorgarinnar hava svarað, at hóast tað er strævi at vera undir eftirliti, so er tað góð hjálp at hava ein at tosa við at koma burturúr revsiógarbrotum,

at fáa eina hjálp, ið ikki fæst aðrastaðir,

at koma burturúr rúsdrekka/rúsevnum,

at fáa hjálp til at koma aftur í arbeiði og

at fáa hjálp til bústað

Kriminalforsorgin her hevur ilt við at hjálpa fólki til bústað, men møguleikarnir at koma í ókeypis rúsdrekka/rúsevnisvigerð ofta uttan bíðitíð eru góðir. Kenni meg púra sannførda um, at í mun til útbúgving og arbeiði, so liggja vit her langt frammanfyri – føroyska arbeiðsmarknaðinum fyri at takka. Tað er so seint sum hesa vikuna at ein verkætlanarleiðari segði: hann skal vera takksamur fyri sín dóm, annars var hann ikki komin her, nú veit hann, at hann dugur nakað, hann upplivir nakað hjá okkum, og við tí tilmæli hann fær, fær hann helst lætt við at fáa læripláss ella annað arbeiði.

Og so hava vit sent so mangan unglingin umborð á fiskiskip og fingu ein vaksnan mann aftur. Teir fingu positivt samband, lærdu at virka í felag og teir vunnu pening. Samanumtikið – flestu teirra, ið vilja til arbeiðis koma til arbeiðis.

Og so má eg siga eina søgu av mongum um skiparan Martin í Sølarfirði, ið farin er fyri mongum árum síðani.

Brian, ið áður hevði verið til skips við honum, hevði framt ein ógerning og fekk fleira ára fangahús. Sat í Danmark og kom heim at sita seinastu tíðina. Einasta hann ynskti, tá hann fór at koma út, var at fara aftur til skips. Eg kendi Martin í Søldafirði. Hann hevði havt fleiri av okkara við – ikki tí, at eg altíð hevði verið millumgongukona. Fór at tosa við Martin. Avtalað var, at hann kom í varðhaldið at tosa við Brian. Jú hann gjørdi av, at taka Brian við sær. Hetta var av sonnum ein góður dagur í Krimunalforsorgini. Men stutt eftir fóru konur at ringja. Skuldi Brian við skipinum, so skuldi teirra maður/sonur ikki við. Eg mundi skelva á málinum, tá eg aftur fór at práta við Martin. Men hann risti hvørki á hondum ella rødd.

Umborð á skipi ræður skiparin, tá eg sigi, at Brian skal við, so kemur hann við. Teir sum ikki vilja við, teir kunnu vera heima.

Allir mans vóru við, tá Martin fór til Flemmish Cap við Briani, sum aftur taldist millum menn og ikki hevur verið aftur í fangahúsi.

### Framtíðin

Nógv er broytt hesi 30 árini og fleiri revsingar vera fluttar úr fangahúsi til fríu Kriminalforsorgina. Sum er, koma nakrir sprittbilistar undir ávísum treytum undir eftirlit av Kriminalforsorgini ístaðin fyri at sita. Tankar eru frammi um, at allir vanligir sprittbilistar skulu undir fríu Kriminalforsorgina annhvørt við treytaðum dómi við sertreyt um rúsdrekkaviðgerð ella við samfelagstænastu. Tað ber væl til, men krevur lógarbroyting. Í Danmark og Svøríki fáa hesi nú eisini tilboð um elektroniska avsiting, um tú ert egnað/ur, men tað verður neyvan hjá okkum – hartil er íløgan ov dýr.

Lítla samfelag okkara er gott í nógvar mátar, og tey flestu fáa ein sess ímillum okkum, tá tey hava staðið sín dóm. Nøkur eru tó, ið hava valt at fara úr Føroyum með alla, tí tey kendu seg ikki væl her longur. Dreymurin hjá starvsfólkunum í Kriminalforsorgini er støðugt at gerast betur til at fáa viðskiftafólk okkara at gera seg leysan av kriminella umhvørvinum og revsulógarbrotum: Vísa á

*at tað ber til,*
*at tað altíð er ein vón, og*
*at tað blíðkar fyri*
*hugaðum fólkum*

# 200 aftur á G!

**Føroya fremsti punkrokkbólkur 200 fær eitt sera virkið summar, umframt, asfalt, Spot Festival, Ungdómstúrin'06 og Roskilde Festivalin verður 200 á G!**

FESTIVAL SUMMARIÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Tíðin tá føroyingar høvdu einarætt upp á politiskt satiriska punkkenda rokkin hjá 200 er av. Íslendingar hava langt síðan latið oyruni upp fyri 200, hetta hevði m. a. við sær luttøku á stóra festivalinum Air Waves í Reykjavík í fjør, eitt ár har bólkurin somuleiðis vitjaði Grønland og Danmark. Í ár hevur stóri talent festivalurin í Århus Spot Festival bjóða 200 á vitjan og Roskilde Festivalurin avdúkaði í farnu viku, at 200 spæla 3 konsertir á ársins festivali. Men heimligi dunnuhylurin er ikki gloymdur, nú útheimurin sendur boð eftir 200. Bólkurin luttekur á asfalt og Ungdómstúrinum '06 og í dag avdúkar G! Festivalurin, at 200 og pappmasjefokkjúfingurin vera á ársins festivali.

200 hevur átt nakrar av bestu framførslunum á G!, bæði í 2003, 2004 og 2005, og gjørdist konsertin í 2005 legendarisk, m.a. orsaka av tí fantastiska pappmasje fokkjúfingrinum, men eisini tí hetta árið var 200 heitasta føroyska tónleikanavnið við risa 15 teimum bestu hittinum Musclemanblað og hittfløguni Viva La Republica.

Í ár verur 200 aftur aktuellur við nýggjari fløgu, ið verður spæld inn í juni, og kenna vit 200 rætt fer speiski føroyski rokkurin aftur í ár, at vinna nógv føroysk hjørtu ung sum gomul.

Tað er eingin bólkur, ið á sama hátt sum 200 er vorðin ímyndin av G! Festivalinum, ikki minst orsakað av framførsluni í fjør. Tí er hetta eitt navn, ið flestu føroyingar hørvdu vænta á G! plakatini.

Niels Arge Galán sangari í bólkinum hevur heldur ongantíð lagt skjól á, at konsertirnar á G! hava serligan týdning fyri bólkin.

G! Festivalurin hevur higartil almannakunngjørt, at íslendski Mugison og týr av fremstu føroysku singer songwriter nøvnunum Teitur, Eivør og Høgni Lisberg luttaka. Talsmaðurin hjá G! Festivalinum Jón Tyril segði við planet.fo í fjør, at væntandi vera umleið 35 nøvn á G! 2006. Fleiri útlendsk nøvn eru eftir at avdúka, og væntandi verður okkurt av útlendsku nøvnunum avdúka hesa vikuna. Atgongumerkini vórðu sett til sølu fríggjadagin.

# Páll Finnur Páll á Jóansøkufestivalinum

**Nú hevur Jóansøkufestivalurin kunngjørt enn eitt navn, ið fer at framføra á festivalinum. Umframt Andrew Strong og Carpark North, fara eisini teir í Føroyum so kendu Páll Finnur Páll á pallin. Jóansøkufestivalurin fer í komandi viku at avdúka enn fleiri nøvn, ið fara á pallin á jóansøku**

TÓNLEIKUR

Fyrsta føroyska navnið á Jóansøkufestivalinum er nú kunngjørt. Tað eru limirnir í Páll Finnur Páll, ið fara á pall á joansøku, skrivar www.joansokufestivalurin.com



Páll Finnur Páll er langt síðan vorðin fólkaogn. Bólkurin hevur eini heilt serlig evni at skriva fangandi og syngiviðvinarlig poppløg. Lagið "Forelskaður Sjónleikari" av fyrru fløguni hjá bólkinum er tað størsta popp hittið í føroyskum tónleiki seinastu nógvu árini. Á n‡ggju fløguni hjá bólkinum, fær rokkurin ein eitt sindur størri leiklut. Fleiri tekstir hjá teimum eru so ófantaligir, at teir ikki kunnu verða spældir í føroysku loftmiðlunum. Tað gerst so serliga langt úti, tí hesar ófantaligheitir verða bornar fram í fittum popp hami. Men Páll Finnur Páll er altíð frálíkur á konsertum. Bólkurin er stutt sagt ein av bestu føroysku tónleikabólkunum í løtuni.

Jóansøkufestivalurin fer í komandi viku at avdúka enn fleiri nøvn, ið fara á pallin á jóansøku.

# Eric The Red fær gott viðmæli

Heimasíðan www.heavymetal.about.com gevur fløguni Eric The Red, ið júst er endurútgivin á tungmálmsplátufelagnum Napalm Records, fýra av fimm stjørnur, og heitur á fólk um at keypa fløguna.

Ummælarin Chad Bowar sigur, at hetta er besta tungmáls fløga hann hevur hoyrt við einum føroyskum bólki, tí at hetta samstundis er einasta føroyska fløga hann hevur hoyrt. Men at líka mikið hvar fløgan er frá, so er hetta ein sera góð víkinga-/fólka málms fløga.

Sangirnir er uppbygdir og eru sera fjølbroyttir, sigur Bowar og heldur fram at røddin hjá Hera Joensen er bæði góð og serlig.